gult12 cyan12 magenta12 svart12

ítróttur

Nr. 99 • leygardagur • 26. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Pól gevur avboð

**Eftir trætumál við FSF um bonuspengar fyri sigurin á Luksemburg, er Pól Thorsteinsson somikið harmur, at hann hevur givið avboð til komandi landsdystirnar**

LANDSLIÐSAVBOÐ
*Jákup Mørk*



*- At byrja við hugsaði eg kanska um, at pengarnir høvdu nakað at siga, men nú er tað blivið til eitt prinsipp hjá mær, sigur Pól Thorsteinsson*

Hóast tað neyvan nervar nakran í Jugoslavia, so er nú líkt til, at ófriðarliga støðan í fjør nú hevur við sær, at Pól Thorsteinsson ikki er tøkur at spæla á føroyska landsliðnum.

At dysturin móti Jugoslavia varð fluttur til 16 .august í ár hevði nevnliga við sær, at Pól Thorsteinsson framvegis hevði ein dag leikbann, tá føroyska liðið fór til Luksemburg, og tí ikki kundi taka lut í 2-0 sigrinum.

## Ongar bonuspengar

FSF sigur nevnliga, at tá leikari ikki er við á dómaraseðlinum, hevur hesin ikki rætt til bonuspengar, og hetta hevur fingið øði í Pól.

Hann vísur á, at eftir sigurin á Luksemburg tóktist einki vera galið. Lagið var gott, og sum skilst, hevði Pól tá eisini fingið at vita, at hansara partur av bonusupphæddini ikki skuldi liggja eftir. Sjálvur sigur Pól, at hann ikki varnaðist hetta, fyrr enn hann fekk avrokningina frá FSF fyri ferðina.

- Tá eg fekk avrokningina, setti eg meg beinanvegin í samband við Jens Martin, sum er umboðsmaður hjá spælarunum, og hann at tosaði so við FSF mína vegna. Tá hetta einki úrslit gav, bað hann meg seta meg í samband við Jens Erik Magnussen, og hann bað meg orða eitt skriv til FSF.

- Skrivið varð so viðgjørt á fundi, men FSF kom til somu niðurstøðu, sum landsliðsnevndin var komin til. Nevnliga at bonuspengar bert verða útgoldnir, um leikarin hevur verið á dómaraseðlinum.

- Eg má bara siga, at eg eri ótrúliga skuffaður av viðferðini, og tí havi eg givið avboð til teir báðar komandi dystirnar. Hevði eg vita av hesum áðrenn, so kundi tað jú verið, at eg als ikki var við í Luksemburg, men ístaðin bert fór til Russlands. At tað skal vera somikið avgerandi fyri FSF, um teir rinda bonus til 17 ella 18 leikarar, dugi eg als ikki at skilja, sigur Pól, sum eisini leggur dent á, at tað ikki so nógv eru pengarnir, sum hava fingið hann at taka hesa støðu.

- At byrja við hugsaði eg kanska um, at pengarnir høvdu nakað at siga, men nú er tað blivið til eitt prinsipp hjá mær, og sum støðan er, so ætli eg mær ikki at spæla við landsliðnum, sigur Pól, sum tó samstundis leggur dent á, at avboðið í fyrsta umfari bert er til teir báðar komandi dystirnar.

# Innrás úr Klaksvík á ólavsøku

**Steypafinalan verður endurtøka av 1999 finaluni, tá Tomislav Sivic, sum nú er venjari hjá KÍ, stóð á odda fyri B36, sum tapti 3–1**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

Í Fótbóltssambandinum hava teir neyvan nakað ímóti, at tað hósdagin eydnaðist klaksvíkingum at kvalifisera seg til finaluna um løgmanssteypið, sum verður á Tórsvølli ólavsøkudag. KÍ man vera tað felagið, sum oftast hevur nógvar áskoðarar við sær til dystir á útivølli. Serliga tá nógv stendur upp á spæl, hevur ferðingarhugurin hjá klaksvíkingum verið stórur.

Tað sást fleiri ferðir í fyrraárið, tá KÍ vann nógv. Síðani tá hevur tað gingið minni væl hjá KÍ, og tað hevur sást aftur á huginum at ferðast við KÍ. Men samstundis er svongdin hjá KÍ áskoðarunum stór eftir at síggja teirra lið vera við í fremsta stríðnum. Á ólavsøku eru altíð nógvir klaksvíkingar í høvuðsstaðnum, og tí man lítið vera at ivast í, at tað fara at vera fleiri KÍ viðhaldsfólk á Tórsvølli ólavsøkudag, enn tað nakrantíð áður hava verið til ein fótbóltsdyst hjá KÍ í Gundadali.

B36 eigur nógv trúgv viðhaldsfólk. Ofta vísir tað seg, at ábyrgdin fyri at stuðla kennist størri, tá liðini eru á útivølli, enn tá tey eru á heimavølli. Men tað er eingin ivi um, at B36 viðhaldsfólkini fara at skipa seg væl undan ólavsøkuni. Fótbólthugað kring landið hava í fleiri ár eftirlýst spenningi í ólavsøkufótbóltinum. Nú er lagt upp til spenning og dramatikk, og tí er tað neyvan langt av leið at rokna við, at áskoðarametið í Gundadali stendur fyri falli. Áskoðarametið til fótbólt í Gundadali man ikki vera langt frá teimum 5.500 áskoðarunum, sum møttu upp, tá Turkaland og Føroyar spældu 1–1 15. juli 1991.

## Endurtøka

Finalan ímillum B36 og KÍ verður ein endurtøka av finaluni í 1999. Ta ferðina vunnu klaksvíkingar 3–1. Tomislav Sivic var venjari hjá B36. Nú er hann venjari hjá KÍ. Heðin á Lakjuni var á KÍ liðnum. Nú er hann á liðnum hjá B36.

Áðrenn B36 og KÍ hittast á Tórsvølli sunnudagin 29. juli, skulu tey hittast eina ferð í landskappingini. Tað verður á ovara vølli í Gundadali í sjeynda umfarinum, sum verður á skránni sunnudagin 17. juni.

Steypavinnarin tryggjar sær pláss í UEFA Cup kappingini á sumri 2001. Tað er eisini ein møguleiki fyri, at taparin í steypafinaluni sleppur upp í part í Europa. Soleiðis verður tað, um steypavinnarin eisini vinnur FM. Seinast tað kom fyri, var í 1999, tá KÍ vann FM og steypafinaluna – við 3–1 sigri á B36, sum nú hevur møguleika at siga takk fyri seinast.

# Jón Rói sleppur við

**Nýggjur maður í landsliðshópinum fyri Pól Thorsteinsson verður Jón Rói Jacobsen**

LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk*

Tað var erin harmur Allan Simonsen, sum hósdagin fekk boðini frá Pól Thorsteinsson um, at hann ikki verður tøkur til komandi landsliðsuppgávurnar.

- Støðan minnir sum so um avboðið hjá Toda. Tað er keðiligt, at eitt avboð skal koma soleiðis, og tað er so avgjørt ikki nakað, sum styrkir hópin, sigur Allan Simonsen, sum tó ikki vil gera nakrar viðmerkingar til málið við Pól.

- Til tað kenni eg málið alt ov lítið, og tí fái eg ikki sagt nakað.

## Jón Rói í hitan

Ístaðin fyri Pól Thorsteinsson hevur Allan Simonsen tikið Jón Róa Jacobsen úr HB út til landsliðið. Hesin hevði júst fingið boðini, tá vit hósdagin prátaðu við hann, og hann var sjálvandi fegin um møguleikan, sum hann nú hevur fingið.

- Tað er sjálvandi nakað, sum eg altíð havi droymt um, og hóast eg ikki havi gingið og roknað við hesum, so var eg ikki heilt bilsin, sigur Jón Rói.

- Eg varð eisini tikin út til venjingarleguna í Spania, men hetta var beint áðrenn eg skuldi til Derby at venja, og tí gav eg avboð. Eg havi tí líka sum vita av, at eg taldist millum teir á leið 30 leikararnar, sum eru í myndini til hópin.

Jón Rói, sum bert er 18 ára gamla, ivast ikki í, at hetta er eitt stórt framstig fyri seg. Eisini hóast hann ikki roknar við at vera millum teir fyrstu 11 á vøllinum.

- Tað er so einki at ivast í, at hetta er eitt stórt pluss. Ikki minst, tí hetta kann gera meg meira áhugaverdan fyri útlandinum, og tað er so avgjørt nakað, sum eg eisini droymi um. Eg vil tó ikki siga, at eg rokni við at sleppa at royna meg í dysti. Til tað eri eg kanska ov óroyndur, men fái eg kjansin, so geri eg sjálvandi mítt besta.

- Fyri fyrst eri eg bara fegin um at sleppa við, og so má eg bara royna at vísa meg frá míni bestu síðu undir venjingunum, sigur Jón Rói Jacobsen at enda.

gult13 cyan13 magenta13 svart13



VB-GÍ:

# VB skal steðga GÍ



*Gøtumenn rokna við einum truplum dysti í Vági, har heimaliðið aftur er fullmannað*

**Enn hevur eingin skala GÍ í landskappingini, men vágbingar ætla sær nú at gerast teir fyrstu**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Higartil hevur gingið sum eftir ánni hjá GÍ. Fýra dystir hava kastað 12 stig, og tað er við vónunum um nr. 13, 14 og 15, at teir um vikuskiftið fara at vitja føroyameistararnar í Vági.

Hetta skal tó ikki skiljast soleiðis, at vágbingar ætla sær at geva oddaliðnum nakra gávu. VB hevur nú aftur alt fólkið tókt, og hetta merkir ivaleyst, at teir báðir pólversku áleypararnir eins og Tórður Holm allir fara at byrja inni.

Um sjálvan dystin móti GÍ heldur málverjin hjá VB, Bjarni Johansen, at hesin so avgjørt skal vinnast.

- Tað skulu allir heima dystir, so sjálvandi fara vit eftir sigrinum. Tað gera vit so hvørja ferð, men at tað so ikki altíð eydnast, er ein onnur søk, heldur hann.

## Fleiri ivamál

So væl tykist ikki standa til hjá gøtumonnum. Tá vit hóskvøldið prátaðu við venjaran, Johan Nielsen, segði hann, at fleiri ivamál vóru í hópinum.

Málverjin, Hallur Hansen, noyddist at gevast við venjingini hósdagin, og verður hann ikki við, má nýggjur maður setast í hansara stað. Harafturat var hóskvøldið ivamál um fleiri aðrar leikarar. Bartal Eliasen, Hans Pauli Petersen, Magni Jarnskor og Zdzislaw Janik eru allir meira ella minni skaddir, men hóskvøldið var so eingin støða tikin í so máta.

- Eg vóni sjálvandi, at teir verða klárir til dystin, men enn er ov tíðliga at svara nøkrum, segði Johan Nielsen.

Hann helt annars, at dysturin í Vági vanliga er millum teir torførastu hjá GÍ, og at hann so avgjørt heldur ikki roknar við nakrari léttari uppgávu hesaferð.

# Útiliðini hava fyrimun

**Bert í uppgerðini millum B36 og FS Vágar hevur heimaliðið staðið seg betri søguliga**

HAGTØL
*Jákup Mørk*

Líkt er til, at vit kunnul rokna við fleiri útisigrum hetta vikuskiftið. GÍ, KÍ og HB hava øll staðið seg væl á útivølli, tá talan hevur verið um mótstøðuliðini sunnudagin. Bæði hjá NSÍ og GÍ skal leitast aftur til 1994 fyri at finna seinasta heimasigurin, meðan VB hóast alt vann heimadystirna móti GÍ bæði í fjør og 1998.

Hinvegin hevur B36 havt sera gott tak á, tá vágamenn hava vitjað í gundadali. Meðan talan hevur verið um felagslið úr Vágoynni hevur B36 bara vunnið, men tá SÍF í 1992 vitjaði í seinasta umfarinum var talan um sigur til útiliðið. Talvan niðanfyri er annars lagað soleiðis til, at fyri FS Vágar eru tølini fyri 1992 og 1991 fyri ávíkavist SÍF og MB.

Tá B68 í 1994 vitjaði á Eiði, fekk EB/Streymur eitt av fáu stigunum, sum teir fingu tað kappingarárið. Higartil hava teir longu fingið fyrsta útisigurin í bestu deildini, og so er spurningurin, um teir megna at leggja nakað afturat úrtøkuni sunndagin.

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| VB-GÍ | 5-3 | 1-3 | 3-1 | 0-0 | 0-4 | 0-2 | - | 2-3 | 1-2 | 1-0 | 3-1-5 | 13-18 |
| B71-KÍ | 0-4 | 1-2 | - | 0-5 | 0-6 | 1-4 | 2-0 | 2-1 | 1-2 | - | 1-0-6 | 7-24 |
| NSÍ-HB | 1-3 | 0-2 | 0-4 | 1-1 | - | 0-0 | 4-1 | - | 0-3 | 0-0 | 1-3-4 | 6-14 |
| EB/Str.-B68 | - | - | - | - | - | - | 0-0 | - | - | - | 0-1-0 | 0-0 |
| B36-FSV | 6-1 | - | - | 4-2 | 5-1 | 3-2 | - | - | 2-4 | 6-0 | 5-0-1 | 26-10 |




B36-FSV:

# Kravið er ein sigur

**B36 eru greiðir favorittar, tá teir sunnudagin taka ímóti vágamonnum**

UPPTAKT

**Jákup Mørk**

Talan verður um tvey skerd lið, sum fara á vøllin í Gundadali sunndudagin. Onkur vildi kanska hildið, at menn sum Jens Kristian Hansen og Pól Thorsteinsson áttu at viga tyngri enn Hannus Olsen og John Johansen, men kortini er smeiturin helst nógv dyggari hjá vágamonnum.

John, sum er langtíðarskaddur, og Hannus, sum fór út við skaða móti EB/Streymi, eru nevnliga í nógv størri mun millum berandi kreftirnar á vágaliðnum, og hartil er breiddin hjá árstalsfelagnum væl størri, enn hon er hjá FS Vágum.

Hóast B36 møguliga eisini má vera Bjarna Prior fyri uttan, so gerst favorittleikluturin neyvan minni hjá B36 av skaðastøðuni, og einki er at ivast í, at áskoðararnir krevja ein sigur, helst tryggan sigur, av leikarunum.

Vágamenn vilja helst seta seg nøgdar við minni, og fáa teir eitt stig við sær vestur aftur, er einki at ivast í, at teir verða ovurfegnir.